# Krígsbrotsmenn fjala seg í Danmark

**Fyrrverandi herleiðarin hjá Saddam Hussein býr í dag í Sorø**

Tað hevur elvt til øsing í Danmark, nú tað er komið fram, at ein fyrrverandi herleiðari hjá irakska forsetanum, Saddam Hussein, býr í Danmark og hevur frítt at fara í landinum og kann tískil eisini ferðast frítt í øllum ES.

Maðurin fekk politiskt friðskjól í Danmark fyri nøkrum árum síðani, tí donsku myndugleikarnir mettu, at hann fór at verða forfylgdur, bleiv hann sendur aftur til Irak.

Nú er komið fram, at maðurin sum herovasti hevði ábyrgdina, tá irakski herurin nýtti eiturgass í einum álopi á kurdar har norðuri í Irak í 1988. M. a. skal hann hava havt beinleiðis ábyrgdina av álopinum á býin Halabja, har 5000 kurdar doyðu at gasseitranini.

Kurdar í Danmark eru eisini í øðini og krevja, at fyrrverandi herleiðarin verður tikin og ákærdur fyri krígsbrotsverk. Politiska andstøðan í Danmark krevur eisini, at myndugleikarnir taka neyðug stig.

Andstøðan heldur avdúkingina av fyrrverandi irakska herleiðaranum vera eitt tekin um, at donsku innflytarareglurnar eru ov linar. Poul Nyrup Rasmussen, forsætisráðharri hevur eisini boðað frá, at stjórnin fer at herða verandi reglur.

### Ikki tann einasti

Tann irakski herleiðarin býr nú í Sorø á Sælandi. Danska sjónvarpið royndi at fáa orð á hann týskvøldið, men hann vildi ikki tosa við sjónvarpsmannin, sum tó fekk at vita, at fyrrverandi herleiðarin gongur í skúla, so hann kann læra seg danskt mál.

Gamli herleiðarin hjá Saddam Hussein er ikki tann einasti útlendingurin í Danmark, sum verður lagdur undir krígsbrotsverk. Ein maður úr Sierra Leone verður hildin at hava beint fyri fleiri mótstøðufólkum í heimlandinum, áðrenn hann kom til Danmarkar, og ein maður úr Burundi er undir illgruna fyri at hava beint fyri 20 fangum, áðrenn hann kom hendanvegin.

**(Fartekst)**

# USA hevur prógvini móti bin Laden

**Pakistan sigur seg framvegis ikki hava sæð nakað prógv**

Tað var NATO-aðalskrivarin, George Robertson, sum boðaði frá, at NATO nú hevur fingið tey neyðugu prógvini frá USA, sum vátta, at saudiarabiski yvirgangsmaðurin Osama bin Laden hevði samband við yvirgangsatsóknirnar í New York og Washington tann 11. september.

Sambært aðalskrivaranum vísa prógvini, at allir vegir í rannsóknunum leiða til bin Laden og felagsskap hansara al-Qaeda.

NATO segði seg upprunaliga stuðla USA í stríðnum ímóti teimum, sum skipaðu fyri atsóknunum. Samstundis bleiv avgjørt at nýta grein 5 í NATO-sáttmálanum, sum sigur, at eitt álop á eitt ella fleiri av limalondunum er eitt álop á øll londini. Men fyri at hetta kundi lata seg gera, máttu amerikanarar prógva, at atsóknirnar vóru fyriskipaðar uttan fyri USA. Tað er tað prógvið, NATO nú sigur seg hava fingið, og tí boðaði George Robertson frá, at samgongan nú virkar eftir fimtu grein í sáttmálanum.

### Einki prógv sæð

Pakistan, sum eisini hevur kravt at fáa prógv frá amerikanarum, sigur seg framvegis ikki hava sæð nakað, sum prógvar, at bin Laden og al-Qaeda høvdu samband við atsóknirnar í New York og Washington.

Tað kunngjørdi uttanríkisráðið í Islamabad í gjár.

Stutt frammanundan hevði amerikanski sendiharrin í Pakistan, Wendy Chamberlin, tosað við Pervez Musharaf, forseta. Hevði hon prógvini við sær, hava tey eftir øllum at døma ikki sannført pakistansku leiðsluna, sum framvegis hevur diplomatiskt samband við Taliban-stýrið í Afghanistan.

**(Fartekst)**

# Nyrup vil samstarva um yvirtøkur



*Tað krevur drúgvar fyrireikingar, um føroyingar skulu yvirtaka løgregluna og rættarskipanina, tí talan er um so grundlgeggjandi mál fyri eitt rættarsamfelag, segði Poul Nyrup Rasmussen í setanarrøðuni hjá sær týsdagin*

*savnsmynd*

**Danska stjórnin er sinnað at samráðast um løgregluna og rættarskipanina, og tað liggur nú í hondunum á landsstýrinum at gera av, um tað vil luttaka í einum samstarvi um hesi økini, segði danski forsætisráðharrin í setanarrøðuni hjá sær týsdagin**

*Magnus Dam*
*Keypmannahavn*

Ikki óvæntað snúði røðan hjá Poul Nyrup Rasmussen seg í høvuðsheitum um yvirgangsatsóknirnar tann 11. september og tiltøkini, sum stjórnin ætlar at seta í verk fyri at minka um vandan fyri yvirgangi.

Heimurin er broyttur eftir 11. september, segði forsætisráðharrin, sum eisini nam við leiklutin hjá føroyingum og grønlendingum í hesum broytta heimi, har ein altjóða samgonga stríðist móti yvirgangi.

- Tað er mín varhugi, at tað eisini í Grønlandi og Føroyum er semja um at luttaka í altjóða arbeiðinum í øllum okkara trimum samfeløgum. At tryggja, at upplýsingar ganga báðar vegir, so Føroyar og Grønland vita, hvat hendan altjóða samgongan fæst við, segði forsætisráðharrin, áðrenn hann kom inn á politisku støðuna í Føroyum og Grønlandi.

### Landsstýrið avgerð kósina

Poul Nyrup Rasmussen nevndi í hesum sambandi enn einaferð, at føroyingar sjálvir gera av, hvussu framtíðar viðurskiftini millum Føroyar og Danmark skulu skipast. Hetta varð staðfest í orðaskiftinum um Føroyar í Fólkatinginum 9. mai í ár, har Fólkatingið eisini segði seg vera sinnað at viðgera eina sjálvstýrislóg ella tillaga heimastýrislógina.

- Nú arbeiða vit so eftir áheitan frá landsstýrinum miðvíst við, at landsstýrið kann yvirtaka eina røð av málsøkjum. Tá ið málsøkini á almannaøkinum og skúlaøkinum eru yvirtikin, minkar blokkstuðulin 350 milliónir krónur, vísti hann á.

### Krevur neyvar fyrireikingar

Viðvíkjandi ætlanunum hjá landsstýrinum at yvirtaka løgregluna, rættaskipanina og sivilrættarliga økið, legði forsætisráðharrin dent á, at hesar yvirtøkurnar mugu fyrireikast sera væl.

- Talan er um grundleggjandi mál fyri eitt rættarsamfelag. Tað er týdningarmikið, at yvirtøkurnar eru sera væl fyrireikaðar, tað er púra neyðugt fyri føroyska samfelagið og rættartrygdina, segði hann.

Stóra stríðsmálið í sambandi við hesar yvirtøkurnar hevur higartil verið, um tað er neyðugt at broyta heimastýrislógina ella ikki. Landsstýrið sigur nei, meðan stjórnin higartil hevur sagt, at tað verður neyðugt við broytingum.

Poul Nyrup Rasmussen ballaði júst hendan spurningin eitt sindur inn í sínari røðu. Men hann segði tó, at tað verður neyðugt við einari lógarbroyting og sipaði helst til broytingar í heimastýrislógini.

- Treytin fyri, at hetta kann lata seg gera, er, at ein lógarbroyting verður gjørd, sum kann verða grundarlag undir sovorðnum yvirtøkum, sum í dag eru reguleraðar í heimastýrislógini, segði forsætisráðharrin.

Stjórnin hevur skotið upp, at ein arbeiðsbólkur ger fyrireikandi arbeiðið. Hetta skal vera grundarlagið undir politisku støðutakanini, so landsstýrið í einari náttúrligari og væl skipaðari raðfylgju kann yvirtaka løgregluna og rættarskipanina.

- Tað er nú upp til Føroyar at taka støðu til luttøkuna í einum tílíkum samstarvi, segði forsætisráðharrin.

Eins og við ólavsøkurøðuni hjá løgmanni í Føroyum, verður orðaskiftið í Fólkatinginum um setanarrøðuna hjá forsætisráðharranum. Hetta orðaskiftið byrjar í dag, og tá fara teir báðir føroysku fólkatingslimirnir, Óli Breckmann og Jóannes Eidesgaard, at siga sína hugsan um røðuna hjá Poul Nyrup Rasmussen.



# Saknar altjóða orðaskifti



*Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, saknar seriøst orðaskifti um altjóða viðurskifti*

**Høgni Hoydal, landsstýrismaður, saknar alment orðaskifti í Føroyum um altjóða viðurskifti. Ikki minst nú, allur heimurin tosar um tiltøk til verju móti yvirgangi**

POLITIKKUR
*Edvard Joensen*

Føroyingar eiga at fáa allan avgerðarrætt í Løgtingið, so vit kunnu stýra øllum orðaskiftum um viðurskfti í Føroyum.

Soleiðis er ein av setningunum hjá Høgna Hoydal, landsstýrismanni við lógarmálum.

Hann sipar til, at nú allur heimurin tosar um, hvørji tiltøk skulu setast í verk til at verja seg móti yvirgangi, verður tað, sum skal gerast í Føroyum, viðgjørt og avgjørt í Danmark. Tað eigur at liggja í Løgtinginum, sigur hann.

Løgtingið hevur altíð sjálvt ynskt at hava ábyrgdina av tí, sum gjørt verður í Føroyum. Og trygdin í landinum er sanniliga einki undantak, sigur Høgni Hoydal í viðmerking til setanarrøðuna hjá forsætisráðharranum, tá Fólkatingið varð sett týsdagin.

Poul Nyrup Rasmussen, forsætisráðharri, nýtti mesta partin av røðuni til at viðgera yvirgangsálopini á USA í seinasta mánað og fylgjurnar av hesum.

Eisini kom hann inn á, at Føroyar og Grønland sum partar av danska ríkinum eiga at vera við í altjóða tiltøkum móti yvirgangi.

Tað er í lagi, heldur landsstýrismaðurin við lógarmálum. Men hann vil tó halda, at vit skulu sjálvir gera tað av og ikki bara fáa boð úr Danmark um, hvussu farast skal fram á eitt nú flogvøllinum í Vágum.

Sjálvandi er orðaskifti í Føroyum eins og alla aðrastaðni. Men tað verður bara ikki tikið nóg seriøst, fyrr enn tað er Løgtingið sjálvt, sum stendur við endaliga orðinum, sigur Høgni Hoydal.

### Bíðað leingi

Høgni Hoydal, landsstýrismaður, fegnast eins og løgmaður um, at danir nú vilja samstarva um yvirtøkur eftir føroyskum leisti.

– Men hasum hava vit bíðað eftir nú í hálvtfjórða ár, sigur hann.

Høgni Hoydal sigur, at eftir fundin við Frank Jensen, løgmálaráðharra, herfyri, vildi onkur vera við, at ósemja var teirra millum um, hvussu málini um yvirtøkurnar skuldu loysast. Men soleiðis er ikki, tí líkt er til, at tosað varð um tvey ymisk mál í føroysku fjølmiðlunum, sigur hann.

Høgni Hoydal sigur, at hann fer at seta eina nevnd at arbeiða við yvirtøku av rættarmálum og løgreglu í einum. Tann nevndin skal mannast við fólki úr teimum báðum arbeiðsbólkunum, sum longu nú í longri tíð hava arbeitt við júst hesum málunum.

Løgtingssamtyktin um hesi bæði málini sigur, at rættarmálini skulu vera klár at taka yvir á nýggjárinum 2004, meðan løgreglan skal yvirtakast á nýggjárinum 2006.

Danska stjórnin miðar eftir, at fyrireikingararbeiðið hjá teirri embætismannanevndini, sum løgmálaráðharrin mælir til at seta, skal vera liðugt ultimo 2002. Og tí tekur Høgni Hoydal, landsstýrismaður undir við.

Hann sigur tó, at arbeitt eigur at verða í tveimum nevndum. Einari føroyskari og einari danskari, sum so koma til eitt felags úrslit. Í tí sær hann ongan trupulleika, sigur hann.

### Annað mál

Málið um persóns- familju- og arvarætt, sum Høgni Hoydal vil hava avgreitt í hesum árinum, er heilt annað mál enn yvirtøka av rættarskipanini.

Líkt er tó til, at fólk ikki geva sær nóg væl far um hetta og blanda tey tingini saman.

Hesi málini eru mál, sum ríkisumboðið umsitir fyrisitingarliga í dag. Tey eru donsk burturav og rættiliga ótíðarhóskandi, vísir Høgni Hoydal á. Talan er um lógarverk heilt afturi frá 1932, sum framvegis er galdandi í Føroyum, hóast tey í Danmark langt síðan eru broytt.

Eitt nú vísir hann á, at í Føroyum er til dømis ikki møguligt at hava felags foreldrarætt yvir einum barni, um foreldrini ikki eru gift. Heldur ikki, um tey búgva samn. Slíkt er langt síðan dagført í Danmark, men ongantíð sett í gildi her hjá okkum.

Tað eitur rættur og er sjálvandi eisini rættur hjá fólki at eiga tvey foreldur. Men tað skal tó ikki blandast saman við revsirætt, vísir Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, á.

# Eftir føroyskum ynski

**Forsætisráðharrin boðaði í setanarrøðu síni í Fólkatinginum frá, at arbeitt verður við yvirtøkum eftir føroyskum ynski. Tað dámar løgmanni væl**

SETANARRØÐA
*Edvard Joensen*

Arbeitt verður miðvíst og konstruktivt fram í móti, at føroyingar yvirtaka fleiri nýggj málsøki. Hetta verður gjørt eftir ynski frá føroyingum, segði Poul Nyrup Rasmussen, forsætisráðharri, millum annað, tá Fólkatingið varð sett týsdagin.

– Tað er hugaligt at staðfesta, at arbeiðið skal gerast soleiðis, sum vit vilja hava tað gjørt, sigur løgmaður. Øðrvísi ber ikki til at skilja røðuna hjá forsætisráðharranum, sigur hann.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, heldur ikki nakað nýtt ella órógvanddi vera í tí, forsætisráðharrin segði í setanarrøðu síni.



*Løgmaður fegnast um, at forsætisráðharrin boðar frá, at komandi yvirtøkurnar verða gjørdar eftir føroyskum leisti*

– Hatta er bara tað, sum avtalað er millum stjórnina og landsstýrið, sigur hann.

Løgmaður sigur, at tað sjálvandi er greitt, at tá talan verður um yvirtøkur, skulu lógarbroytingar til. Soleiðis hevur tað altíð verið.

Tá vit nú tosa um at yvirtaka rættarmálini, skal danska rættargangslógin setast úr gildi í Føroyum, og ein nýggj, føroysk lóggáva gerast og setast í gildi í staðin.

Nógvir tænastumenn skulu eisini yvirtakast, tá tann tíð kemur, og eisini tað skal gerast við lóg, vísir løgmaður á.

Landstýrið hevur samtykt at fara undir hatta arbeiðið, og tað er so tað, forsætisráðharrin nú staðfestir, vísir løgmaður á. Hvussu tað verður gjørt í smálutum, dugir løgmaður ikki at siga beint nú, men slær tó fast, at tað verður ikki farið út í nakað stríð um smálutir.

Doculivo Journa
8. & 9. Oktober
Doculivo Sag
7. Oktober
formula.fo